## Forlan er vandamiklast

Diego Forlan er vandamiklasti álopsspælarin í Europa í hesum kappingarárinum. Forlan, sum er ættaður úr Uruguay, spælir fyri Atletico Madrid, og hann skoraði ikki færri enn 32 mál í farna kappingarári. Hetta ger hann til besta málskjútta í Europa í ár, og hann verður heiðraður við gylta bólinum. Nummar 2 á listanum er Samuerl Eto'o, og nummar 3 er Marc Janko, sum spælir fyri Salzburg í Eysturríki.



## AB annað beinið í finaluni

AB vann greiðan sigur í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini hjá kvinnum. AB var á vitjan í Vágum, har felagsliðið 07V/MB tók ímóti. Úrslitið av dystinum gjørdi 6-1 sigur til oddaliðið av Argjum. Hóast avgerðin mann vera fallin í hesari hálvfinaluni, so skulu liðini spæla ein dyst afturat. Hann verður spældur á Argjum.

AB-B36 3-1 (1-1):

# Upp um stórabeiggja

**Fyri fyrstu ferð í søgu felagsins hevur AB lyft seg upp um eitt av teimum báðu stóru feløgunum í høvuðsstaðnum. Sigurin á grannunum úr B36 var fult uppiborin og undirstrikar, at AB als ikki ætlar sær úr aftur bestu deildini**



*Fagnaðurin var stórur hjá AB, tá teir í gjár vunnu á B36. Sigurin ber við sær, ta AB fyri fyrstu ferð í søgu felagsins er upp um ein av stórubeiggjunum í høvuðsstaðnum*

*Mynd: Terji S. Johansen*

AB

B36

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Lagið var framúr á Argjum mánadagin. Sum lítlibeiggi í høvuðsstaðaðarøkinum hevur AB í mangar mátar havt eitt slag av undirlutakenslu mótvegis teimum báðu stóru feløgunum, HB og B36.

Ikki tí. Tá AB var í Formula-deildini í 2007 eydnaðist tað at fáa fýra stig til høldar móti teimum báðum grannunum, og í steypakappingini sendu teir eisini B36 út. Men í samlaða roknistykkinum hava argjamenn kortini altíð verið teir minnu í høvuðsstaðnum.

Men hetta broyttist mánadagin

### B36 domineraði

AB-veitslan byrjaði longu eftir bara einum minutti. Fyrsta álopið hjá heimaliðnum kastaði hornaspark av sær, og tá Alex Mellemgaard sera væl sendi hetta innfyri, kundi Tehe Aristide stýra bóltinum í netið til sítt fyrsta mál fyri argjamenn.

Málið átti at givið vertunum eitt fínt útgangsstøði til restina av dystinum, men ístaðin hendi tað, sum so ofta hendir í slíkum førum. Nevnliga at liðið fór ov nógv í verjustøðu.

Tað gav B36 alt initiativið úti á vøllinum, og størsta partin av fyrra hálvleiki varð hetta eisini gagnnýtt til at leggja eitt stórt trýst á AB-málið.

Tað var tó langt ímillum veruliga opnu møguleikarnar, men eftir 12 minuttum spurdist tó úrslit burturúr. Janus M. Joensen varð dømdur fyri at toga Johan Ellingsgaard niður í brotsteiginum, og so fekk Klæmint Matras møguleikan úr 11 metrum.

Í fyrstu atløgu bjargaði Tórður Thomsen skotinum, men Høgni Eysturoy var skjótur á returinum, og so stóð á jøvnum.

Málið gav B36 mót til at halda fram ágangandi spælinum, men tað var ov sjáldan, at B36 veruliga hótti. Næstur við var Høgni Eysturoy, sum fyri fyrstu ferð byrjaði millum teir fyrstu 11, men Tórður Thomsen fekk væl jústað følda skotið út til horna.

### Uppiborið

Eftir steðgin var myndin í spælinum kanska tann sama, har tað var B36, sum hevði bóltin mest. Og har tað eisini vóru teir, sum royndu at trýsta.

Munurin hjá heimaliðnum var tó nú, at AB í nógv størri mun var til reiðar at svara aftur. Støðugt vóru kantarnir við til at breiða spælið út á vøllin, og við djúpum sendingum niðan um hornið varð B36-verjan fleiri ferðir tagað sundur.

Og tað var eisini AB, sum hevði so nógv teir størstu møguleikarnar í seinna hálvleiki. Fleiri av teimum fyrstuvórðu tó misnýttir, men tá Høgni M. Joensen hevði misnýtt tann størsta av hesum, mundu heimafólkini ivast í, um tey nú skuldi fáa nakra løn fyri stríðið.

Men tað fingu tey so hóast alt. Janus M. Joensen slapp at hevna seg fyri sítt brotsspark, tá Klæmint Matras mest sum fløktist upp í beini hjá Dánjal Róa Olsen, tá hesin gjørdi sær dælt av misskiljing í B36-verjuni.

Brotssparkið varð sent trygt í netið, og hesa ferð gjørdi AB ikki sama mistakið, sum teir gjørdu fyri steðgin. Teir hildu fyri tað mesta rimmar fast um konseptið, har denturin varð lagdur á ein kompaktan verjupart, fyri síðani at dúva upp á drepandi kontra-álop, sum skuldu lukka dystin.

Ikki minst var Tehe Aristide ein brandur í verjuni, men í yvirtíðini var tó um reppið, at eitt mistak frá hansara síðu kostaði tvey stig. Brima Koroma vann bóltin, tá Aristrede skuldi skerma út til málspark, men lukkutíð fyri AB sendi Johan Ellingsgaard rimmarkjansin framvið málinum. Og tá AB so bara fá sekund seinni kom upp á 3-1, tá Herbert í Lon gjørdi sjálvmál, var alt farið hjá gestunum. Fyri fjórðu ferð á rað noyddist B36 av vøllinum uttan stig, og nú byrjar ein ávísur likamspartur spakuliga at orna.

### Lokali samleikin

Hjá AB er sami likamspartur tó púrasta kaldur. Við hørðum arbeiði og góðum treysti hevur AB longu skapt sær eitt sera gott útgangsstøði fyri restina av árinum, og seinastu dystirnar er kontraparturin av spælinum mentur sera nógv.

Og ikki minst tað vera hugagott hjá argjafólki at staðfesta, hvussu væl fleiri av lokalu spælarunum standa seg. Alex Mellemgaard var framúr mánadagin, eins og Rói Danielsen var tað í verjuapartinum. Jobin Drangastein arbeiddi hart, og innkomin vísti Dánial Rói Olsen, at hann eisini væl kann blanda seg í kappingini um plássini. Ein kapping, sum bara tykist harðna í AB-leguni, og sum uttan iva er gleðilig hjá venjaraparinum.

## Tungt at venda

Eftir fjórða tapið á rað var tað sjálvandi ein vónbrotin liðskipari hjá B36, sum vit fingu orð á, tá tapið móti AB var veruleiki.

- Hetta er avgjørt ikki nøktandi hjá okkum. Eg veit ikki reiðiliga, hvat tað er, men tað virkar, sum um koppar alt alla tíðina ímóti okkum fyri tíðina, sigur Klæmint Matras.

Tit síggja út til at hava gott tak á dystinum fyri steðgin. Hvat gongur galið í seinna hálvleiki?

- Eg veit ikki, um tað gongur nakað galið. Og vit eru sum so eisini stýrandi eftir steðgin. Men teir fáa eitt straffi, sum eg ikki dugi at síggja. Og tað tykist, sum er tað alla tíðina soleiðis, at tingini ikki koppa til okkara fyrimun.

So tað er kanska ein spurningur um hesar væl kendu marginalarnar?

- Í øllum førum er tað øgiliga ringt at koma burtur úr hesum ringa stimanum. Men tað mugu vit so royna at arbeiða okkum úr, sigur Klæmint Matras.

**-mørk**

## Nógvar orsøkir til úrslitini

Lagið í AB-leguni var framúr eftir dystin mánadagin. Góða gongdin hevur higar til givið AB 14 stig, og John Petersen, sum er annar av venjarunum hjá felagnum, staðfestir, at hesi ikki eru komin av tilvild.

- Tað eru fleiri ting, sum hava gjørt tað. Menninir eru sera nærlagdir til bæði venjing og dyst. Vit hava ein heimavøll, har næstan eingin fær nakað við sær aftur. Og so hava vit eisini leikaratilfar til at skapa dystir. So sjálvt um vit eru uppflytarar og spáddir at flyta niður aftur beinanvegin, so meta vit, at vit hava dygdir á liðnum, sum kunnu avgera dystir. Og tað síggja vit eisini í dag, sigur John Petersen.

- Vit hava eisini arbeitt við nógvum tingum, sum vit vilja gera betri. Fyrst og fremst er tað sjálvandi verjuparturin, sum skal rigga nóg væl. Men haraftat hava vit eisini arbeitt við nøkrum tingum frameftir vøllinum, og vit komu til kjansirnar. Enntá somikið nógvar kjansir, at vit í dag burdu havt lukkað dystin longu miðskeiðis í seinna hálvleiki, segði ein væl ngøður AB-venjari.

**-mørk**